# Eg vil hava eina treytaleysa umbering frá Tjóðveldisflokkinum og Miðflokkinum!

**Kaj Leo Johannesen**
*løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Var saman við Lisbeth L. Petersen í einari beinleiðis sending á Rás 2, har vit høvdu høvi at svara spurningum frá øðrum flokkum um ymisk mál.

Tá so umboðið fyri Tjóðveldisflokkin skírir allar føroyingar, sum ikki velja Tjóðveldisflokkin, at verða í ørviti, og umboðið fyri Miðflokkin fylgir upp og sigur Kaj Leo og Lisbeth tangera til at vera landasvíkjarar, so haldi eg at hetta ikki skal sleppa óátalað framvið, uttan at ein treytaleys umbering kemur frá hesum báðum flokkum.

Havi havt og komi at hava virðing fyri øðrum hugsanum enn eg sjálvur standi fyri, men at hoyra umaftur og umaftur "Svart Samband" og at vit venda Føroyum bakið, er bert boðskapir undir beltið.

Men frá tí og so til at kalla okkum, sum ikki velja Tjóðveldisflokkin ella Miðflokkin at verða í ørviti og at tangera til landasvik, er so langt úti, at eg havi ikki orð fyri hesum. Og so slettis ikki, tá Tjóðveldisflokkurin skal eitast at verða tenn reini flokkurin í føroyskum politikki.

Havi umboðað mítt land innan landsliðsfótbólt, innan politikk og innan vinnulív, so at hoyra slíkar skuldsetingar ger meg bæði illan og keddan!

Við virðing.

# Okkara samfelag - við at kvalast av loysing

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins í Vágum*



Vinnan og borgarin eru við at kvalast - orsaka av loysingarpolitikki.

T.v.s. at teir eru við at kvala alt samfelagið. Hóast teir bert eru byrjaðir at loysa, so er heimsins hægsta skattatrýst longu veruleiki fyri fólk og vinnu. Og fíggjarlógin, ið tíbetur ikki varð samtykt, hækkaði skattirnar enn meira.

Gongdin má broytast. Leiðin má leggjast um. Sambandsflokkurin má sleppa til. Fólk og vinna mugu og skulu aftur anda frítt. Loysingin skal burtur, vælferðin skal tryggjast og skatturin niður.

Sum einasti flokkur er Sambandsflokkurin komin við einum ítøkiligum uppskoti um at geva vinnuni og fólkinum luft, við at geva ein ítøkiligan skattalætta. Loysingarflokkarnir, ið bert vilja hækka skattin enn meira, tí teir skulu loysa, eru í panik. Tað skilja vit væl. Fólk duga nú at síggja, at ikki bert hevur løgmaður logið, men alt loysingarprojektið er ein sápubløðra fylt av lygnum um eina gylta framtíð í ein fullveldi - har tey sum ikki eru rýmd av landi - eru køvd av skatti.

Latið føroyingar sleppa at anda frítt.

X lista B Sambandsflokkin

## VALGREINAR

# Almenna umsitingin

**Rói Egholm**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Ein stórur partur av okkara ungu, sum flyta heimaftur eftir lokna útbúgving, verða sett í starv innan almennu umsitingina í Føroyum. Vit hava eitt stak væl útbúgvið og dugnaligt fólk í almennu umsiting okkara, men arbeiðsumstøðurnar, sum vit bjóða hesum fólkum, eru kanska ikki altíð tær bestu.

Í hesum valstríðnum hava mest sum allir flokkar sagt, eisini Tjóðveldisflokkurin, at almenna umsitingin er ov kostnaðarmikil, og at hon ikki virkar, sum hon skal.

Tá ið tosað verður um miðfyrisitingina, so meini eg, at bygnaðarskipanin hjá Finn Norman Christensen er ein skriviborðsloysn, sum eingi atlit hevur tikið til fyritreytirnar í føroyska samfelagnum. Tí eru broytingar og endurmetingar av hesi skipan neyðugar og átrokandi. Tað skylda vit øllum teimum, sum arbeiða hjá tí almenna og øllum Føroya fólki.

Vit eiga at gera eina føroyska miðfyrisiting, sum er nógv meira málrættað og liðilig, og sum fyrst og fremst er lagað til føroysk viðurskifti. Hetta setur eisini stór krøv til landsstýrisfólkini, sum í framtíðini mugu hava væl greiðari málsetningar og eina nógv gjøgnumskygdari leiðslu, enn tey hava í dag.

Tað eru nógv mál, sum hava gliðið væl ígjøgnum almennu skipanina, og er hetta, tá ið landsstýrisfólk, leiðslan og øll, sum arbeiða við málinum, eru fullgreið yvir, hvat endamálið er. Men um leiðslan ikki er greið og málrættað, so kámast endamálið fyri starvsfólkinum. Tey ørkyml-ast og úrslitið verður hareftir.

Vit kunnu ikki standa og hyggja at, at øll hesi vælútbúnu starvsfólkini arbeiða innan eina almenna skipan, sum beinleiðis køvir áræði og arbeiðshug, tí at leiðslan er ógreið, og at samskipanin ikki virkar sum tilætlað. Heldur ikki kunnu vit bjóða hesum fólkum, at tey ferð eftir ferð verða hongd út, tí at leiðsla ella landsstýrifólk ikki megna sína uppgávu til fulnar ella tí at skipanin ikki virkar, sum hon skal.

Tað er einki mál í sær sjálvum at hava eina lítla umsiting. Málið er at hava eina vælvirkandi almenna skipan, sum nøktar føroyska tørvin og sum liggur á einum kostnaðarstøði, sum svarar til tað, ið samfelagið hevur tørv á og sum inntøkurnar til samfelagið kunnu bera.

# Fólkafloksrakettirnar

**Jørgen Niclasen**
*valevni Fólkaflokksins í Vágum*



Fólkafloksrakettirnar hava roynst væl. Seinasta rakettin eg minnist frá Sambandinum var í 1996, tá sambandsløgmaðurin eftir flogvanlukkuna í Selvík boðaði frá, at nýggjur flogvøllur skuldi byggjast aðrastaðni í Føroyum. Danir søgdu takk og knalluðu kassan í.

Sune Jacobsen finnst í valgrein at Fólkaflokkinum og tosar um rakettir. Fólkafloksrakettirnar hava roynst Vágoynni væl. Vágatunnilin fekk Fólkaflokkurin gjøgnumført, somuleiðis Gásadalsbergholið, Skipaeftirlitið og nýggja tyrlu fyri at nevna nøkur. Sambandsflokkurin var í móti, men tað eydnaðist at fáa hesi gjøgnumførd. Ikki so galnar, hasar Fólkafloksrakettirnar, halda sjálvt Sambandsfólk.

Seinast eg minnist eina rakett frá Sambandinum var í 1996, tá sambandsløgmaðurin eftir flogvanlukkuna í Selvík boðaði frá, at nýggjur flogvøllur skuldi byggjast aðrastaðni í Føroyum. Danir søgdu takk og knalluðu kassan í.

Næsta stigið hjá Fólkaflokkinum er at yvirtaka og útbyggja flogvøllin. Íløgan er minni enn Vágatunnilin. Hetta skal gerast eftir sama leisti sum Vágatunnilin. Fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis. Ferðaavgjaldið skal sjálvandi fara til p/f Flogvøllin og verða partur av rakstargrundarlagnum.

Anfinn Kallsberg og Anders Fogh hava havt nógvar samrøður um júst flogvøllin, har tónin frá danskari síðu er óbroyttur síðan sambandsúttalisi í 1996. Og tó, at fíggja eina útbygging úr íleggingargrunninum er ein møguleiki. Tað nýggja er, at føroysk og donsk embætisfólk undir samráðingunum um yvirtøkulógina hava nevnt møguleikan fyri at teingja 3 ting saman. Hesi eru yvirtøka av flogvøllinum og Kirkumálum (prestagarðar), sum eru útreiðslur og yvirtøka av Íleggingargrunninum. Hetta er ikki komi upp á pláss, men er heldur ikki avvíst frá danskari síðu. Ein møguleika, ið kann gera tað lættari.

Sambandsflokkurin er ikki kendur fyri nógv krút. Men góðu tit, tað tit hava av krúti, brúkið tað til framburð, tað ger Fólkflokkurin við góðum úrslitum fyri Vágoynna.

# Almenna fyrisitingin má minka

**Meinhardt Hansen**
*valevni Sambandsflokksins í Norðoyggjum*



Fyri góðum 2 árum síðan vaknaði løgmaður við kaldan dreym og staðfesti at vit brúktu eina milliard meira um árið, uttan at nakar visti um vit fingu nakað fyri peningin. Nú var stundin komin, har vit sleptu forkromaðum donskum skipanum og funnu loysnir, ið hóskaðu til føroyska samfelagið.

Síðan tørnaði hann eftir øllum at døma innaftur, tí almenni vøksturin hevur bara staðið við og versnað, einki sæst til "serføroysku" loysnirnar, men er forkromingin hinvegin farin at skalla av, so man sær beint inn á sminkaða fullveldislíkið.

Einasta privatisering, ið er framd seinastu 6 árini er kunningardiskurin á flogvøllinum, heili 1 (eitt!!!) arbeiðispláss, men bløðini eru framvegis á tremur við lýsingum eftir fólki til tað almenna, samstundis sum hópuppsagnir eru t.d. umborð á rækjuskipum og innan alivinnuna.

Hetta má fáa ein enda, og tað gerst ikki við at flyta almennar funktiónir innan eitt nú heilsuøkið frá útjaðaranum og til Havnar. Hinvegin kann tað t.d. gerast við at innføra setanarsteðg í miðfyrisitingini.

Sambandsflokkurin hevur havt ítøkilig uppskot um at effektivisera umsitingina við at minka um talið av almennum ráðum. Higartil hevur tíverri ikki verið undirtøka fyri hesum, tí yvirtøku- og loysingarflokkarnir halda tað vera stuttligari at pussa krom.

Vil tú vera við til at broyta skeivu gongdina í býtinum millum almenna fyrisiting og privata vinnu, vel so Sambandsflokkin.


# Kunngerð

**Til veljarar til løgtingsvalið 20. januar 2004 í Sumbiar kommunu.**

Atkvøðugreiðslan fer fram týsdagin 20. januar 2004 á hesum støðum:

**Fyri veljarar í Sumba og Víkarbyrgi:**
**á kommunuskrivstovuni í Sumba**

**Fyri veljarar í Lopra og Økrum:**
**í skúlanum á Leiti**

Atkvøðugreiðslan fer fram millum kl. 10.00 og kl. 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni til og við mánadagin 19. januar 2004.

Tey, ið vegna sjúku ella væntandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima til og við dagin fyri valið. Hesi kunnu boða kommunuskrivstovuni frá hesum á tlf. nr. 370344, 373506 ella 373150 í seinasta lagi mánadagin 19. januar kl. 15.00.

Gjørt verður kunnugt, at valkort verða send øllum veljarum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna sum skjótast.

13. januar 2004

**Valstýrið í Sumbiar Kommunu**

UNITED seafood **P/f Føroya Fiskavirking**

# Reingerð

Søkt verður eftir einum fólki til reingerð, at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin er aftaná dagliga framleiðslu.

Arbeiðið umfatar framleiðslurúm og útgerð.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Rakul á tlf. 219907.

**P/F Føroya Fiskavirking, Vestara Bryggja**
Postboks 218 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 355555 · Telefax 312631

# Vágafólk

Fríggjakvøldið kl 19.30 verður Javnaðarcafe í SÍ húsinum í Sørvági. Á skránni verður tónleikur, skemt og felagssangur.

Øll eru vælkomin.

nakað fyri

**Vága Javnaðarfelag**
www.javnadarflokkurin.fo

# Suðurstreymoyar Sjálvstyrisfelag

*Sjálvstýrisflokkurin hevur kafé á Kafé Karlsborg í Vágsbotni*

*fríggjadagin og sunnudagin frá kl. 15.00 til 23.00*

*leygardagin og mánadagin frá kl. 10.00 til 23.00*

*og týsdagin frá kl. 10.00*

*Fríggjakvøldið og leygarkvøldið undirhalda Terji Rasmussen og Svenn Brimheim frá kl. 21.00 til kl. 23.00.*

*Høvið verður at hitta valevnini.*

**Sjálvstýrisflokkurin**
www.sjalvstyrisflokkurin.fo




**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

# Sjúkrarøktarfrøðingur

**Deild M – Medicinsk songjardeild**

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar:

Frá 01.03.04 til 15.10.04 32 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

Frá 01.03.04 til 31.08.04 24 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

Frá 01.04.04 til 31.10.04 32 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

Harumframt verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi, heilsuatstøðingi ella sjúkrahjálpara frá 01.04.04 til 31.12.05 36 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:** Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
Fakligan áhuga innan medicinska sjúkrarøkt
Góð samstarvsevnir
Ynskiligt er við royndum innan øki

**Setanartreytir:** Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Synnøvu Hansen, deildarleiðara telefon 45 54 63 lokal 403 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 29. januar 2004 kl. 12.00.

# Bilar til sølu

**Galloper Innovation 2.5 TD Intercooler 5 setur**



prísur 148.000,-

Gráur metalllakk · Árgang 1999 · Km. 95.000 · 5 setur
Aircondition · Altimetur · El-spegl · El-rútar framman
Hita í setrum · Tokulyktir · Lættmetalfelgur við heilársdekkum
Summardekk fylgja við · Vælhildin

**Mercedes CLK 320 aut. bensin**



Árgang 2001 · Km. 20.000 · Automat gear tiptronic · 4 setur
Gráur mettallakk · Klimaanlegg · Grá leðursetur við hita
Multifunktiónsróður · Parkeringssensorar · Mercedes anlegg
við fleiri diskum · 6 stk Bose hátalarar · innbygda telefon
og nógv annað. Til sølu um hóskandi boð fæst.

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo